## Dragin skipar fyri hugnakvøldi



Stuðulsfelagið Dragin í Klaksvík skipar leygarkvøldið 8. mars klokkan 19 fyri stórum borðhaldi við sangi, undirhaldi og dansi. Seinastu vetrarnar hevur tað verið fastur táttur hjá Draganum at skipa fyri hugnakvøldi í Skálanum. Eftir heitan mat og undirhald verður góður gamlamannadansur, har Heini Z. Dahl og Jákup Marner Anthoniussen spæla. Inntøkurnar frá tiltakinum fara allar til at stuðla skúlaskipinum Dragin, har skúlaungdómurin lærir sjómansskap umborð um veturin, og eisini lærir at sigla við seglum um summarið.

## Skandinavia og Spaðar 5

Tað verður eftir øllum at døma góður hýrur í høllini á Hálsi nú leygarkvøldið, tá ið Scandinavia og Spaðar 5 spæla til dans, og nógv fólk hava tryggjað sær atgongumerki til tiltakið. Scandinavia, sum kemur til Føroya í morgin, er eitt væl umtólk orkestur. Fleiri av limunum hava spælt saman síðan stovnanina í 1988, og við fleiri enn túsund konsertum í sjáttuni er talan um eitt av best samanspældu dansiorkestrum yvirhøvur. Eisini Spaðar 5 við Ólavi Øster og hansara monnum stillar upp við sterkastu manning, so tað verður fyrsta floks tónleikur alt kvøldið. Tað er Róðrarfelagið Knørrur, sum skipar fyri kvøldinum, og avlopið frá tiltakinum fer alt til ungdómsvirksemi felagsins.

# Noyðast at gjalda fyri kavarok

**Vit fáa ikki avsláttur í sjónvarpsgjaldinum, hóast tekniskt brek hevur ført við sær, at onki sjónvarp hevur verið í fleiri dagar**

SJÓNVARPSGJALD
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Hóast sendarin hjá sjónvarpinum hevur ligið bakk í fleiri umførum í seinastuni, skulu sjónvarpshyggjarar ikki vænta sær avsláttur í sjónvarpsgjaldinum.

Tað staðfestir Kristina Háfoss, landsstýriskvinna í mentamálum.

Í løgtinginum vildi Kári P. Højgaard, løgtingsmaður, hava at vita um húsarhald fáa avsláttur í kringvarpsgjaldinum, nú vit hava sitið við svørtum skermi í fleiri dagar.

Hann staðfestir, at eftir lógini, eru tað bert húski, sum hava tól, sum kann taka sendingar frá Kringvarpi Føroya, ið hava skyldu at gjalda kringvarpsgjald.

Veruleikin er sjálvandi, at øll tól kunnu taka sendingar, hóast sendarin er sløktur. Hinvegin er tað politiski myndugleikin, sum hevur skyldina av, at vit framvegis hava ein avoldaðan sendara til sjónvarp og millumbylgju og eitt vánaligt sendinet.

- Tí er tað ivasamt, um vit hava skyldu at rinda tann partin av kringvarpsgjaldinum, ið er ætlað til sjónvarpið í hesum tíðarskeiðinum, sjónvarpið ikki hevur sent, sigur Kári P. Højgaard.

### Ongin avsláttur

Men Kristina Háfoss ger greitt, at vit skulu ikki seta nøsina upp eftir at fáa avsláttur í kringvarpsgjaldinum.

Hon vísir á, at í lógum og kunngerðum um hetta stendur, at tey, sum hava tól, sum kunnu taka sendingar, skulu rinda kringvarpsgjald.

Tað hevur sostatt onga týdning, hvussu nógvar tímar, Kringvarpið sendir.

Hon sigur, at ein atvoldin til trupulleikan, er, at politiski myndugleikin hevur ikki megnað at tikið støðu til, hvussu sendinet og sendarar, skulu endurnýggjast. Ein onnur atvoldin er, at ov lítið av peningi er sett av til røkt.

Hon segði annars, at samgongan hevur arbeitt undir hátrýsti at loysa trupulleikan og hon vónaði, at uppskot kann leggjast fyri Løgtingið í næstu framtíð.

Men hon vísti eisini á, at tað almenna hevur eisini skyldu til at tryggja, at allir borgarar kunnu taka ímóti sendingunum hjá Kringvarpinum.

Kristina Háfoss upplýsti annars, at í fyrstu syftu verður uppskot lagt fyri Løgtingið um nýggjan millumbylgjusendara og um at byggja FM sendinetið út og tað verður fyrsta dagin.

Annars verður uppskot um sjálvt sendinetið lagt fram seinni, tí har eru nógvar kanningar, sum skulu gerast, áðrenn endalig støða verður tikin.

Men hon vissaði um, at allir møguleikar verða kannaðir, bæði almennir og privatir, og at Løgtingið verður kunnað um teir møguleikar ið eru, áðrenn endalig støða verður tikin.

Men hon váttaði eisini, at tað, sum fyribils liggur í kortunum, er, at útvega eitt talgilt sendinet til sjónvarpi við minst fimm rásum til tað almenna.



*Øll, sum kunnu síggja sjónvarp, skulu gjalda, hóast sjónvarpið ikki sendur. Tað hevur sostatt ongan týdning, hvussu nógvar tímar, sjónvarpið sendir*

# Lovar ikki eftirskúla í Hvalba beinanvegin

**Í langa tíð hevur verið arbeitt við ætlanini at gera ein eftirskúla í Hvalba, men landsstýriskvinnan í mentamálum kann onki siga um, nær hann verður bygdur**

EFTIRSKÚLI
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Enn er púra óvist, nær ætlaði eftirskúlin í Hvalba kann vera bygdur.

Tað staðfestir landsstýriskvinnan í mentamálum, Kristina Háfoss.

Partakvinna hennara, Heidi Petersen, spurdi í tinginum landsstýriskvinnuna, hvørja støðu hon hevur til ætlanin at byggja eftirskúlan.

Og nú tað beinleiðis verður skrivað í sjálvum samgonguskjalinum, at eftirskúlin skal byggjast, vónar Heidi Petersen, at hann málið kann fáa eina jaliga politiska viðgerð.

Men Kristina Háfoss kann onki lova.

Hon staðfestir, at tað ber illa til at vera ímóti eini slíkari ætlan.

- Men fortreytin er, at tað er ein greið ætlan fyri skúlanum, at hann er verður raðfestir í eini langtíðarætlan og at tað er ein greiður tørvur á einum slíkum eftirskúla og at tørvurin er útgreinaður.

Kristina Háfoss visti av, at nógvir føroyingar fara uttanlands á eftirskúla, men hon helt, at tað mátti eisini kannast eftir, hvussu nógvir av hesum høvdu havt hug at farið til Hvalbiar á eftirskúla.

- Tað mugu vit vita, so vit ikki standa við eini stórari íløgu, sum ikki verður brúkt.

Hon sigur eisini at nakrir trupulleikar eru við sjálvari lógini um sjálvar eftirskúlar, tí har eru ymsir skeivleikar, sum mugu rættast.

Ein feilur í lógini er, er at tað stendur, at bæði land og kommunurnar skulu rinda 70% í part av ávísum rakstrarútreiðslum, so at stuðulin tilsamans verður 140% og tað er sjálvandi eitt mistak, sum má rættast.

Tað er eisini staðfest, at landið fíggjar helvtina av íløguni, men tað er ikki heilt greitt, hvør skal fíggja hina helvtina.

- Tilsamans er talan um ein skúla, sum kostar 90 milliónir at byggja, umframt at landsins partur av rakstrarútreiðslunum verður einar fýra milliónir um árið, umframt rentur ov adráttir.

Tí segði hon, at tað var neyðugt at seta seg væl inn í málið, áðrenn eitt útspæl kemur.

Hon kundi heldur onki siga um, hvussu frammaliga skúlin verður raðfestir í langtíðarætlanini, sum samgongan fer at leggja fyri allar íløgur, sum skulu gerast. Men eftirskúlin verður ein partur í teirri ætlanini.

Men hon vísti eisini á, at tað liggja nógvir skúlar fyri framman at byggja, eitt nú skúladepil í Marknagili.

Annars skal fundur verða í næstu framtíð ímillum mentamálaráðið og stigtakararnar til eftirskúlan har landsstýsiskvinnan skal fáa eina frágreiðing um málið.

Eyðgunn Samuelsen, forkvinna í fíggjarnevndini gjørdi vart við, at samgongan hevur stórar ætlanir um skúlabygging bæði í Marknagili og Vestmanna og samgongan noyðist at raðfesta íløgurnar, tí hóast samgongan er samd um at leggja stóran dent á undirvísing, kunnu skúlarnir ikki fara við øllum íløgukarminum, sum hann er.

Tí mugu vit taka støðu til, hvat skal raðfestast frammiliga og hvat skal víkja, staðfesti forkvinnan í fíggjarnevndini.